# Saksun

*Tann fyrsti veljarin kom ikki á val fyrrenn klokkan var farin av tvey*

*Tú kanst fara innar í stovuna, meðan hon kann velja við borðið í gongini*

### Sokkar og børn

Klokkan er farin av 17, og líkt er til at húsfólkini eru vorðin svong. Í øllum førum hevur Målfryd sett døgurðan útá – í eini grýtu standa eplini og kóka, og á einari pannu verður kalvafiskur steiktur.

Við eitt borð situr annar limurin í valstýrinum, Gurli Svartá við stokkum í hond. Hon situr og bindur einar sokkar, samstundis sum hon heldur eyguni við at alt við valinum gongur rætt fyri seg.

Triði limurin, Anvør Joensen situr í roynd og veru á gólvinum. Kring hana eru fleiri spælandi børn og tey krevja sítt.

Við eitt verða allar tríggjar avbrotnar í sínum arbeiði. Nú gongur hurðin og ein ung kvinna kemur innar við valkorti í hondini.

Tær sleppa tí tær hava í hondini. Nú er tað hesin veljarin sum skal raðfestast hægst. Tann fimti veljarin í Saksun skal greiða atkvøðu.

Kvinnan fær seðilin í hond, fer innar í stovuna, setir seg við stovuborðið, hyggur listan í gjøgnum og setur kross við tað valevnið, sum hon hevur álit á.

Á einum stóli stendur atkvøðukassin, og higar leggur hon nú leiðina, leggur seðilin í og so hevur hon gjørt sína borgarligu skyldu enn einaferð.

### Seint á val

Vanligt er ikki, at nógvir saksuningar greiða atkvøðu, fyrrenn eftir loknan arbeiðsdag. Fólkatingsvalið 2007 er einki undantak í so máta.

Frá tí at valstaðið lat upp klokkan 9 á morgni og fram til klokkan 17, hava bert fýra veljarar verið á vali. Tann fyrsti veljarin kom ikki á val fyrrenn klokkan var farin av tvey.

- Nei, her er vanligt at fólk koma seint á val. Og í dag er einki undantak, sigur Málfryd.

Hinir tríggir veljararnir, sum longu hava greitt atkvøðu, hoyra til húsfólkið.

Tað man tí helst hoyra til rárastu hendingar at kø er at sleppa á val í Saksun. Men hetta veruliga seinnapartin í gjár.

### Kø við valborðið

Fólk eru komin til heimbygdina frá arbeiði, og velja at leggja leiðina beint á valstaðið. Beint eftir veljara nummar fimm koma ein kvinna og ein maður innar at greiða atkvøðu.

Maðurin er fyrri og fær atkvøðuseðilin í hond.

- Tú kanst fara innar í stovuna, meðan hon kann velja við borðið í gongini. Ella, tú kanst eisini bíða til hann er liðugur, og so kanst tú fara inn í stovuna, um tú heldur vilt tað, sigur Málfryd.

Nei, kvinnan fer út í gongdina og hann í stovuna, og so hava tey greitt atkvøðu.

Tey eru ikki meiri enn farin, fyrrenn hurðin gongur á triðja sinni hesar 20 minuttirnar. Ein kvinna aftrat er komin at greiða atkvøðu.

Hon steðgar á eina løtu og fær eitt prát við húsfólkið og við tíðindamannin. Tey eru gamlir skúlafelagar úr høvuðsstaðnum.

Hon fær seðilin í hond, men hvat – nøvnini á listanum eru skrivað so smátt, at trupult er hjá henni at lesa nøvnini. Hon vil í øllum førum ikki gera nakað mistak, og ætlar sær út eftir brillunum.

- Nei, tað er ikki neyðugt, sigur Gurli. Tú kanst bara læna mínar. Kanska tú kanst brúka tær!

Jú, so er. Kvinnan setur brillurnar á nøsina, og fer so innar í stovuna at greiða sína atkvøðu.

Nú hava 8 av íalt 20 veljarum greitt atkvøðu. Tá upptalt varð høvdu íalt 15 verið á valið her. Tað eru trý færri enn við valið í 2005.

Við seinasta val fingu bert tríggir flokkar atkvøður úr Saksun. Hesaferð fingu allir flokkar, uttan sjálvstýrisflokkurin atkvøður her.

Kanska eitt tekin um at globaliseringin eisini er komin til Saksun.

# Anetta valdi eina kvinnu



*Fyri Anettu Kallsoy hava tey kristnu virðini nógv at siga. Her er hon júst komin út úr valhølunum á Skála*
*Mynd: Snorri Brend*

**Anetta Kallsoy av Skála var á vali seinnapartin í gjár.**

**Hon hevur fylgt eitt sindur við tí, sum valevnini hava ført fram.**

**Fyri hana hava tey kristnu virðini nógv at siga, ikki minst um tey vera løgd fram av eini kvinnu. Hon valdi tí eina kvinnu úr Miðflokkinum – Hjørdis Háberg Petersen úr Kollafirði.**

**- Eg havi onkutíð lurtað eftir Hjørdis, tá hon hevur sendingar á Lindini. Hon torir at standa við síni sjónarmið, hon er frí og eg haldi eisini, at hon hevur nógv at geva, sigur Anetta.**

**Umframt Anettu valdu 24 onnur skálafólk miðflokkin við valið í gjár.**

sb.

# Elduvík er sambandsbygd



*Valstýrið í Elduvík til arbeiðis – vinstrumegin Erling Joensen, Malvinus Reyná og Dánjal Martin Hansen, formaður*
*Mynd: Snorri Brend*

**Við seinasta fólkatingsval fingu bert tríggir flokkar atkvøður úr Elduvík.**

**- Elduvík er sambandsbygd burturav. Hetta prógvaði eisini seinasta fólkatingsval, sigur Dánjal Martin Hansen, formaður í valstýrinum.**

**Við valið í 2005 fekk fólkaflokkurin eina atkvøðu, meðan Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fingu sjey í part. Hinir flokkarnir fingu onga atkvøðu.**

**Tá elduvíkingar fóru á val í gjár var myndin broytt eitt sindur. Hesaferð fingu allir flokkar uttan Sjálvstýrisflokkurin og Tjóðveldisflokkurin atkvøður.**

**Býtið var soleiðis, at fólkaflokkurin fekk tríggjar, sambandsflokkurin seks, javnaðarflokkurin sjey og miðflokkurin eina.**

**Av teimum 24 veljarunum vóru 17 teirra á vali. Hetta svarar til 70,8 %**

sb.